# Tøkk

Eina hjartans tøkk veiti eg øllum tykkum, sum á ymsan hátt heilsaðu mær og sýndu mær heiður á hundraðára degnum.



Tøkk til øll tykkum, sum frá morgunstundini komu við heilsanum, sýndu mær heiður og fingu ein kaffimunn saman við mær:
Løgmaður og Landsstýrið
Borgarstjórin
Almannastovan
Ríkisumboðið.

Tit, sum við telefonheilsanum, fjarritum, blómum og gávum, settu dám á dagin – ikki minst er tøkkin tykkara.

Og øll tit – ætt, vinir og kenningar – sum í hundraðtali um kvøldið komu at hugna tykkum saman við mær og vísa mær sóma.

Vónandi eingin gloymdur. Einaferð enn hjartans tøkk og Harrans signing.

**Anna Chatrina Askham**

50 ár
50 ár

# Móttøka

Í sambandi við at tað týsdagin 1. mai eru 50 ár síðani

**Leivur Ellingsgaard**

byrjaði virksemi sítt í Klaksvík verður móttøka í Skálanum frá kl. 17⁰⁰ til 19⁰⁰

**Øll eru hjartaliga vælkomin**

LE

***Sp/f Leivur Ellingsgaard***
***700 Klaksvík***

VASTI 457171

# Seinastu sýningarnar um vikuskiftið

**Klaksvíkar Sjónleikarfelag sýnir leygardagin og sunnudagin Afturgongur fyri seinastu ferð í Klaksvík**

SJÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

**Klaksvík:** Um vikuskiftið fara teir fimm leikararnir, sum spæla leikin, Afturgongur, fyri seinastu ferð á pallin í Klaksvík.

Leikurin, sum hevur verið sýndur seinastu tríggjar vikurnar, verður at síggja í Atlantis leygardagin klokkan 20.00 og sunnudagin klokkan 17. Hetta vera seinastu sýningarnar í Klaksvík.

Afturgongur er eitt familjudrama, sum Henrik Ibsen skrivaði fyri meiri enn 100 árum síðani. Talan er um ein av klassikarunum í sjónleikarsøguni.

Klaksvíkar Sjónleikarfelag fer at ferðast við leikinum, tá sýningarnar í Klaksvík eru av.



*Jógvan Brim Joensen er ein av leikarunum í leikinum, Afturgongur*

# Fundur um norðoyastevnu

**NFÍ kallar nú frítíðarfeløgini í Klaksvík saman til fund um norðoyastevnu**

STEVNA
*Eyðun Klakstein*



*Nú kallar formaðurin í NFÍ, Jan Gardar, frítíðarfeløg í Klaksvík saman til fund um norðoyastevnu*

**Klaksvík:** Týsdagin fer NFÍ at skipa fyri fundi um norðoyastevnuna. NFÍ stendur fyri norðoyastevnuskránni og samskipar øll tiltøkini á stevnuni.

– Hetta er ein árligur fundur, har vit fara at tosa um teir ymsu møguleikarnar við norðoyastevnuni, og hvørji tiltøk feløgini kundu hugsa sær at havt, sigur Jan Gardar, sum er formaður í NFÍ.

Øll feløgini, sum ætla sær at verða við á norðoyastevnu, verða kalla saman til fundin, sum verður í býráðshøllini í Klaksvík. Fundurin verður týsdagin klokkan 19.00.

Norðoyastevna verður vikuskiftið 8. til 10. juni.

# Útoyggjar betri posttænastu

**Málið skal vera, at fólk á útoyggj fáa post bornar til dyrnar fimm ella seks ferðir um vikuna, heldur Útoyggjanevndin**

POSTUR
*Eyðun Klakstein*

Fólk á útoyggj fáa lítlan ágóða av tíðindaflutninginum í dagbløðunum, og fundarboð og onnur brøv koma javnan ov seint fram.

Hetta vísir Útoyggjanevndin á í áltiti sínum, sum varð latið løgmanni í farnu viku.

– Tá veðurlíkindini forða strandfaraskipum at sigla, kunnu tað ganga upp í tvær vikur við ongum posti. Hetta er veruleikin, hóast tyrlan flýgur til oyggjarnar í hesum tíðarskeiði, sigur Útoyggjanevndin, sum heldur, at tað átti at borið til at samskipa tænastuna soleiðis, at tyrlan kundi verið við, tá ikki var siglandi til oyggjar.

– At fáa postin bornar til dyrnar ella lagdan í postkassan hvønn yrkadag eru tey flestu í Føroyum von við. Men flest merkir ikki øll. Á útoyggjum verður posturin borin út tvær til fimm ferðir um vikuna, alt eftir hvørja oyggj talan er um.

## Nýtist ikki kosta nógv

Útoyggjanevndin vísir á, at Postverkið ikki heldur seg hava neyðugu karmar at virka undir, og tað er orsøkin til, at tænastustøðið ikki er nøktandi á smáu oyggjunum.

Postverkið skjýtur upp, at betra um teir fysisku karmarnar við at samstarva við aðrar almennar stovna, og hesum hugskotinum tekur Útoyggjanevndin undir við. Hetta hugskot verður brúkt í tí, sum Útoyggjanevndin kallar Heildarsamfelagið Bygdin.

Útoyggjanevndin greiðir frá, at ein munandi betring av tænastustøðini ikki nýtist at hava við sær stórar eykaútreiðslur. Tað er líka so nógv so nógv ein spurningur um at umskipa og rationalisera virksemið.

– Málið skal vera, at øll fáa postin, dagbløð og annað, fimm og seks dagar um vikuna, sigur Útoyggjanevndin.

– Tað skal ikki vera útihýst, at lokalsamfelagið sjálvt kann skipa fyri, at allur posturin, bløð og annað verður borið út at dagliga, antin í tøttum samstarvi við Postverkið ella á annan skipaðan hátt, sigur Útoyggjanevndin.



